Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

Fundur: Nr. 4

Tíð: 18.03.2021 kl. 13.00

Stað: Tilhaldið í Tórsgøtu

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

**Fundarskrá:**

1. Góðkenna fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
2. Skriv til TK um lyftu til Tilhaldið
3. Ymist

AD 1 Góðkenna fundarfrágreiðing frá seinasta fundi

Fundarfrágreiðing #3 var góðkend.

AD 2 Skriv til TK um lyftu til Tilhaldið

Skriv frá Juliannu vegna Eldraráðið til TK (att: borgarstjórin Heðin Mortensen) viðvíkjandi atkomumøguleikum í Tilhaldinum var lisið,og ein fullsamd nevnd tók undir við skrivinum.

Julianna hevði skrivað leiðireglur fyri mannagongdir, tá Eldraráðið skipar fyri tiltøkum, og tær vóru somuleiðis lisnar og góðkendar.

Eldraráðið hevur ofta havt trupulleikar av, at samsýningar - tá fólk verða biðin um at upptraðka, undirhalda, at halda fyrilestrar, ella á annan hátt luttaka í tiltøkum - ikki verða goldnar innan fyri eitt eftir okkara tykki rímuligt mark, og Eldraráðið fer tí at biðja um eina fasta manngongd, tá samsýningar skulu rindast, í sambandi við komandi tiltøk í Tilhaldinum.

AD 3 Ymist

Petur eftirlýsti eina fundarfrágreiðing fyri fundin við TK tann 27. januar. Hann spurdi á tí fundinum, um umboð fyri TK skrivaði referat av fundinum, og fekk játtandi svar.

Nevnt var at Eldraráðið átti at avtala kunnandi fund og vitja kommunu, har lutaíbúðir verða bygdar. Og somuleiðis átti Eldraráðið at vitja Pensjónistafelagið í Tórshavn.

Fundur lokin klokkan 14:30

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Næsti fundur verður um 3 vikur, hósdagin 8. apríl klokkan 13 í Tilhaldinum. Sigi frá í góðari tið, um tað ikki liggur fyri at møta.

Tórshavn 20. mars 2021

Petur Rouch,
skrivari